# Minnisvarði
yvir
# V. U. Hammershaimb.

Stór mannfjøld var komin saman undir bókasavninum í Havn 25. mars í ár fyri at heiðra minnið um faðir at skriftmáli okkara, at vera til steðar við avdúkanina av minnisvarða fyri *Venselaus Ulricus Hammershaimb.*

Tað var hátíð — vár, tá ið „Eg oyggjar veit", spældur av Havnar Hornorkestri, ljómaði út yvir mannfjøldina. Tað barst tær fyri, sum orð Fríðriks prósts og lag Hartmanns, borin av ynski Hammershaimbs — „Tað ynskið er mær í hjarta fyri kæra føðilandi mínum og fólkinum, sum her býr — Guds friður yvir øllum" — eins og aldaðu gjøgnum mannfjøldina, gjøgnum rúmdina, hevjaðu seg móti blánanum í erva og boðaðu vár yvir land — boðaðu vár og gróður yvir hesar oyggjar og fólkið, her hevur fest búgv. — —

Janus Djurhuus, skáld, steig so fram og helt avdúkingarrøðuna við hesum orðum:

„Dagurin í dag er skírhósdagur, hann er eisini Mariumessudagur. Vit eru komin saman her á hesum degi, tí tað er føðingardagur Hammershaimbs. Venselaus Ulricus Hammershaimb var borin í heim í Føroyum á hesum degi fyri 129 árum síðani. Vit eru her fyri at heiðra minnið um henda mann og avdúka minnisvarða fyri honum.

Minnisvarðin er gjørdur úr tí tilfari, ið Føroyar eru bygdar úr, hann er gjørdur av føroyskum listarmanni, myndahøggaranum Janusi Kamban, í honum standa høgd inn orð, ið føroyskir menn hava sett saman.

Og givin er hann Føroya fólki til varðveitingar og ognar av føroyskum manni, keypmanninum Jákupi Dahl í Keypmannahavn.

Hvør ið Hammershaimb var, og hvat verk og virki hansara er, eigur ikki bert hetta ættarlið, ið nú er uppi, men eisini komandi ættarlið at vita um og kenna, so leingi Føroyar standa og byggjast av Føroyingum. Verður Hammershaimbs navn gloymt, verk hans og virki gloymt, tá byggjast Føroyar ikki meir av Føroyingum.

Sigast kann, at tá eru Føroyar ikk longur til.

Hammershaimb skapti Føroyingum teirra skriftmál, og harvið

brynjaði hann teir til eitt fólk, eina tjóð, ið nú krevur at vera rópt hin sætta norðlanda tjóðin.



Tá eg skal nýta eina mynd, ið lýsir Hammershaimb og verk og virki hans, so rennur fram fyri meg henda: Ein lítil maður við fínum, mildum andliti stendur fyri háaltarinum í tí dómkirkju, ið eitur Føroyar. Hann lesur messuna á føroyskum máli fyri Føroya fólki. Á altarinum brenna nógv ljós, ið tær mildu veittrar tendraðu, sum góvu honum vit og megi til at vísa Føroya fólki á ta leið, ið ber móti stjørnunum.

Í tí treysti, at henda messa aldri tagnar, men altíð samlar Føroyingar, so leingi Føroyar standa, avdúki eg hervið minnisvarðan fyri Venselaus Ulricus Hammershaimb — Føroya andiliga stórmenni." — — —

Onnur høvdu eisini orðið og bóru fram heilsanir: Maria Mikkelsen bar heilsan frá Hammershaimbsfólkum, Pauli Dahl, yvirlækni, frá føroyskum academikarum og G. Dahl Olsen, sýslumaður, frá Jákupi Dahl, keypmanni í Keypmannahavn, sum hevur givið minnisvarðan. Har aftrat talaði Hans A. Djurkuus, skald, fyri Bókasavnið, sum hevur fingið minnisvarðan í varðveitslu, og J. P. Hendriksen, býráðsformaður, fyri býráðið, sum hevur kostað handverkaraarðeiðið og uppsetan av minnisvarðanum.

Hátíðin endaði við, at hornorkestrið spældi og mannfjøldin sang: „Tú alfagra land mítt". —

Minnisvarðin er samansettur av 4 steinplátum, sum standa í fýrkant. Á aðrari endaplátuni stendur ritað:

*Í 1846 legði V. U Hammershaimb lunnar undir móðurmál okkara.*

Á hinari endaplátuni standa tvær tær seinastu, so ósigiliga vøkru reglurnar í yrking Janusar til Hammershaimb:

*Mildar veittrar tendraðu ein vita,*
*Føroyum stjørnuleið frá øld til øld.*

Á síðunum eru høgdar myndir (relieff). Onnur myndin er brot úr dansiringi; hin myndin er søgumaður, sum sigur frá, og menn standa og lurta eftir. Frálíkar myndir, væl valdar og lívandi. Her gevur listamaðurin, Janus Kamban, okkum teir tveir høvuðstættirnar í menningarsøgu okkara í tveimum myndum: Dansurin og kvæðini, og sagnirnar — grundarsteinarnir undir føroyskari mentan, teir sum hava varðveitt okkum sum fólk gjøgnum góðar og ringar tíðir til dagin í dag.

Á hetta grundarlag bygdi Hammershaimb, tá ið hann skapaði okkum skriftmál okkara. Tað stendur til okkara, ið nú liva — heim og skúla, hvønn einasta Føroying — at varðveita tað, sum vunnið er, og bøta har, tað er neyðugt.

*J. M. K.*

# Kvæði til V. U. Hammershaimb.*)

Á Mariumessu um várið 1899 á 80 ára føðingardegi Hammershaimbs yrkti Símun av Skarði hetta kvæðið til hansara. Tað varð flutt fram við veitslu, sum tá varð hildin fyri Hammershaimb í Keypmannahavn.

Fólkið í Føroyum
fróðskap ei kendi,
hugin var horvin,
heimið var stirt,
vónir várar
vóru sløktar,
menn ei máddu
mæla tá.

Hugin hekk við
hinar gripir,
sum funnust í Føroyum
í firndartíð.
Mótleysir mólu
menn í dula,
stúrdu stórliga
sárir í barmi.

Drekar duldu
dýrgripir góðar,
andaðu eitur
eina tíð,
ognaðu okkum
óminnisdrykkin,
huldu hugin
í hulduheyg.

---

Tysja og tyrpast
um jólatíðir
menn og moyar
í mannahøll.
Dansur dynjar,
doyvir marrur,
kallar kátar
kappar fram.

Hvøllar kvæð'kempur
kvøða við alvi,
níva niður
hvønn niðagrís;
trøllskir tankar
týnast burtur,
drekar dvína
í dansihøll.

Skyldmenn skyljast
skjótt úr dansi,
óminni aftur
eigur vald;
menn og moyar
við møði og ekka
hyggja um heimin
— har er myrkt.

---

Sært tú hin snjalla
sveinin har gongur?
Hansara hugi
hevur ferð;
ei hann ansar
óminnisdrykki:

*) Hevur staðið í „Fuglaframa“.

„neyvan skal náttin
níva meir“.

---

Frættist um Føroyar,
fagnast við gleði,
dripin var drekin,
deyður hann lá;
gullið hann goymdi,
glógvandi vakurt
kom undan kavi
sum klárnandi sól.

Í bjørtum báli
bata fekk tað,
birti í barmi
bjartasta ljós.
Fólkið í Føroyum
føldi sær megi,
gøtan var gingin
og slóðin góð.

Sveinurin snjalli,
sum vit nevndu,
í royndum var reystur
til roysnir og brøgd;
drekan drap hann,
dýrgripin vann hann,
treyst og trivni
trívast tí nú.

Føroya fólk tí
fegið minnist
kappan kringa,
kæra vinin;
lat tí ljóða:
„leingi livi
heilur og sælur
*Hammershaimb!*“

---

# Skúlafrítíð.

**Spurningur til Skúlablaðið.**

Ein lærari á bygd hevur sent fyrispurning til Skúlablaðið viðvíkjandi frítíð við bygdaskúlarnar, og biður hann um svar í bladnum. Í skrivinum til Skúlablaðið sigur bygdalærarin m. a. soleiðis: „Í apríl í ár er ein halgidagur (Dýri biðidagur), so siga summir lærarar, at her er ein frídagur; so fellur mánaðarloyvisdagurin fyri apríl burtur. Aðrir siga, at Dýri biðidagur kemur ikki inn undir merkingina frídagur, tí hann er ein halgidagur. Hvør parturin hevur rætt?“ —

Vit hava spurt formannin í skúlastjórnini um hetta, og sigur hann okkum, at Dýri biðidagur er at fata sum vanligur frídagur, og at mánaðarloyvisdagurin í apríl í ár sostatt fellur burtur.